## Busseigarar endurskoða trygdina

Eftir ta donsku bussvanlukkuna á einum motorvegi nærhendis Berlin í síðstu viku eru danskir busseigarar sinnaðir at endurskoða trygdarreglurnar, sum eru galdandi fyri bussar, sum koyra ferðafólk. John Bergholdt, sum er formaður í danska busseigarafelagnum, sigur við DR, at felagið fer at taka málið upp, so skjótt týska løgreglan er liðug at skriva frágreiðing um vanlukkuna. Tað er komið fram, at tann danski vanlukkubussurin koyrdi koyrdi skjótari enn tað, sum er loyvt. Vanlukkan kostaði trimum dønum lívið.



# Fimm valdømi fyri ting




Hergeir Nielsen, tingformaður, vónar inniliga, at tingið fer at taka undir við at gera Føroyar til fimm valdømi. Í oktoburmánaði í fjør var meiriluti fyri at gera Føroyar til fleiri valdømi, men um fimm valdømi fáa undirtøku fer bert tíðin at vísa
Tilgjørd mynd

**Í komandi viku fer ein meiriluti í formansskapinum at leggja uppskot fyri ting at gera Føroyar til fimm valdømi. John Johannesen og Alfred Olsen í formansskapinum taka ikki undir við uppskotinum, men Hergeir Nielsen, tingformaður, vónar inniliga, at málið kemur ígjøgnum**

VALDØMI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Formansskapurin á Føroya Løgtingi hevur samtykt at leggja uppskot fyri ting at gera Føroyar til fimm valdømi.

– Ein meiriluti er fyri at leggja uppskotið fram, og eg meti, at málið tolir eina viðgerð í tinginum, sigur Hergeir Nielsen, tingformaður, sum í gjár – saman við Jógvani á Lakjuni – gjørdi av at leggja uppskotið fyri ting.

Ein minniluti, John Johannesen og Alfred Olsen, taka ikki undir við at leggja uppskotið á tingborð, men av tí at Hergeir Nielsen er formaður, so eru hann og Jógvan á Lakjuni meiriluti, hóast tveir eru fyri og tveir eru ímóti.

– Nú manglar bara, at vit lata málið í løgfrøðiligan búna, og so verður tað lagt fram í komandi viku, sigur Hergeir Nielsen.

### Formaðurin vónar

Í oktoburmánaði var ein lítil meiriluti á tingi, sambært kanning hjá Sosialinum, at fara frá einum valdømi. Tá høvdu fleiri tingfólk skift hugsan um valdømi síðan 2007, tá skipanin við einum valdømi kom.

Men í seinastuni hava fleiri og fleiri tingfólk greitt frá, at tey stórliga ivast, um fimm valdømi eru rætta loysnin.

Tó er í hvussu so er ein, sum ikki hevur skift meining.

– Eg vóni so inniliga, at hetta verður samtykt, sigur Hergeir Nielsen, tingformaður.

Hann staðfestir tó eisini, at meirilutin í formansskapinum ikki hevur kannað sær nakran meiriluta fyri málinum.

### Broytir nógv

Um tað skuldi verið, at uppskotið um fimm valdømi verður samtykt, so ger tað stórar broytingar í mun til verandi valskipan, men tað ger eisini stórar broytingar í mun til sjey valdømi, sum tað var áðrenn 2007.

Sandoy og Suðuroy verða eitt valdømi – Suður valdømi, Vágar og Norðurstreymur, Kollafjørður undantikin, verða eitt valdømi – Útnyrðings valdømi, Suðurstreymoyar valdømi fær Kollafjørð afturat, Eysturoy verður eitt valdømi og Klaksvík verður eitt valdømi.

Ein uppgerð í Sosialinum fyri kortum vísti, at verða Føroyar sjey valdømi, so hevði til dømis onki Javnaðarumboð verið í Norðoyggjum, og fólkini úr Suðurstreymi á løgtingi høvdu verið færri.